

*Tann 47 ára gamli Konstantin Popov doyði í gjár eftir at hann varð illa bukaður í varðhaldinum hjá løgregluni*

*Mynd: ITAR-TASS*

# Russiska løgreglan bukaði blaðmann í hel

**Løgreglan í Russlandi verður løgd undir valdsmisnýtslu, eftir at ein blaðmaður bleiv bukaður í hel í varðhaldinum í býnum Tomsk. Sambært starvsfeløgunum bleiv hann eisini píndur**

RUSSLAND
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tann 47 ára gamli russiski blaðmaðurin Konstantin Popov doyði í gjár á einum sjúkrahúsi av løstunum, sum hann fekk, tá hann bleiv bukaður, meðan hann var í varðhaldi hjá løgregluni.

Málið hevur vakt stóran ans, og fólk óttast ta harðrendu framferðina hjá løgregluni, sum er komin, eftir at fjølmiðlarnir hava avdúkað fleiri gølur um svik og harðskap.

Popov arbeiddi sum blaðmaður í býnum Tomsk har eysturi í Russlandi. Starvsfelagar hansara siga, at Popov bleiv ikki bara bukaður, men at hann bleiv eisini píndur í varðhaldinum, og teir hava nú mælt løgregluopvastanum í býnum til at leggja frá sær.

Ein kanningarnevnd, sum hevur hugt at tilburðinum, sigur í sínari frágreiðing, at Konstantin Popov varð fluttur á sjúkrahús tann 4. januar, tí hann hevði fingið álvarssamar løstir innvortis, tá ein løgreglumaður hevði sligið hann í einum kliva í varðhaldinum. Sambært nevndini fekk hann ongantíð vitið aftur, og í gjár doyði hann.

## Kann henda øllum

Formaðurin í Tomsk-deildini hjá russiska tíðindamannafelagnum, Aleksej Sevastianov, sigur, at siger, at Konstantin Popov bleiv illa viðfarin við einum luti, men hann vil ikki siga, hvat fyri lut talan er um.

– Hann blkeiv píndur, sigur formaðurin.

Nevndin, sum hevur kannað málið, sigur, at hon hevur skuldsett ein 26 ára gamlan løgreglumann fyri grovan harðskap og valdsmisnýtslu. Løgreglumaðurin, sum eitur Aleksej Mitajev, hevur viðgingið, at hann sló Konstantin Popov, men sigur, at tað var strongd, sum fekk hann til at leypa framav. Hann er fyribils loystur úr starvi.

Konstantin Popov átti í miðlahúsinum Tema. Ábyrgdarblaðstjórin, Konstantin Karpatjiov, sigur, at tað var neyvan arbeiðið hjá Popov, sum kostaði honum lívið.

– Hatta kann henda okkum øllum. Hetta vísir, at yvirgangurin hjá løgregluni er vendur ímóti okkum øllum, sigur ábyrgdarblaðstjórin.


# ORKUTØKNINGUR TIL MAGN

Vit sóknast eftir orkutøkningi til Magn Hitatænastuna í Suðurstreymi

**Um Magn**
Magn tryggjar orku til Føroyar og føroyingar. Vit eru 130 starvsfólk, svarandi til 80 ársverk. Høvuðsskrivstova okkara er í Havn og deildarskrivstovur eru í Klaksvík og á Tvøroyri. 10 service støðir bera Magn navnið, av hesum eigur Magn tær 4. Vit hava goymslur í Klaksvík og í Havn, og mált uppá sølu eru vit ein av Føroya størstu fyritøkum.

**Um starvið**
Hitatænastan hjá Magn tekur sær av árligum eftirliti og tænastuvakt til okkara sethúsa- og virkiskundar. Árliga eftirlitið umfatar millum annað reinsan av oljufýri og ketli og kannan og stillan av oljufýri. At oljufýrið er stillað rætt verður tryggjað við eftirlitsmátingum. Øll úrslit og tilmæli verða skrásett í eftirlitsbók.

**Um hitatænastuna er annars at siga:**
Tænastan er besta trygd fyri eini vælvirkandi oljufýrsskipan, tvs. eingin óneyðug oljunýtsla og munandi minni vandi fyri sótskaðum við meira. Tað arbeiða í alt 9 ábyrgdafullir, raskir og vællærdir orkutøkningar í Hitatænastuni hjá Magn, og hesir tryggja sethúsum og virkjum í øllum landinum hita allar 365 dagarnar um árið. Um skipan óeydnutíð sløknar, er hjálpin tó skjót og nær.

**Uppgávur í stuttum:**
- Árligt reins, eftirlit og innstilling av størri og minni hitaverkum í Suðurstreymi.
- Tænastuvakt 4. hvørja viku
- Veita kundum okkara bestu ráðgeving um orku og orkuverk teirra.
- Tryggja okkara høga tænastustøðið
- Verða ein partur av framhaldandi menningi av Magn hitatænastuni.

**Vit bjóða:**
Eitt gott, avbjóðandi og ábyrgdarfult starv í eini fyritøku í menning. Her er vítt til veggja, og um vilt og dugir, so sleppur tú eisini. Tað er avgerðandi, at tú ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og at tú loysir tínar uppgávur væl. Av hesi orsøk fært tú góðan stuðul og alla neyðuga upplæring og útbúgving.

**Vit vænta:**
- Viðkomandi handverkaraútbúgving, so sum rørsmiðjur, maskinsmiðjur, elektrikari ella líknandi.
- At tú ert tænastusinnað/ur og góð evni at samskifta og samstarva
- At tú hevur áræði og dugur at arbeiða sjálvstøðug.

**Okkara virði eru:**
- Kundin í fokus
- Vitan og førleiki leingi livið
- Skjótt er gott
- Gleiði gevur megi.

Um tú umhugsar at søkja starvið, vinarliga fær inn á www.magn.fo og hygg nærri eftir, hvussu vit á Magn arbeiða við virðum felagsins í okkara dagliga arbeiði.

Hevur tú spurningar, vinarliga vend tær til Leif Hovgaard á telefon 347443, 237443 ella á leif@magn.fo

Umsóknir við prógvum skulu latast inn innan 07. februar kl. 16.00. Antin við at senda bræv til:

***Magn***
***Vestara Bryggja 10***
***FO-110 Tórshavn***
***Att.: Leif Hovgaard***

Ella við at senda teldupost til leif@magn.fo

www.magn.fo

magn TÍN ORKA